**Býráðsfundur mánadagin 27. januar 2010 kl. 19.30.**

**Á fundi:** Jóhan Christiansen, Hans Mourits Foldbo, Joen Magnus Rasmussen, Páll Isholm , Terji Lervig, Hanna Jensen, Jan Erlingsson Petersen og Tollakur Joensen

**Ikki á fundi:** Fríðgerð Heinesen

**Fundurin lokin kl. 23.30**

| | **Fundarskrá:** | **Fundarsamtykt:** |
|---|---|---|
| 1. | **11/00007**<br>**Marknaumskipan millum matr. nr. 62a og matr. nr. 347ak í Leirvík**<br>Í sambandi við at ognin á matr. nr. 347ak skal skeytast til nýggjan eigara er komið fram, at sethúsini eru bygd inn á matr. 62a í er festijørð (Óli Olsen)<br><br>Umsitingin hevur kannað málið og staðfest, at markapeli er settur niður í norðasta horninum uml. 3,0 metur frá sethúsinum. Í sambandi við at útstykkingina bleiv grundstykkið hjá Óla nakrar fermetrar størri og ein gøta løgd í økið.<br><br>Vit hava fingið upplýst frá Jóhan, at Karl frá Matrikulstovuni hevur sett stykkið av, men av missgávum er tað norðasta grundstykkið ikki rættað til ella frábýtið ikki gjørt.<br><br>Tekniska nevnd mælir til at marknaumskipanin verður framd. | Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá teknisku nevnd. |
| 2. | **11/00034**<br>**Frábýting av seyðahúsi á matr. nr. 194a**<br>Umvhvørvisstovan hevur biðið Eysturkommunu ummæla umsókn frá Búnaðarstovuni um frábýtingar av seyðahúsum í Leirvík. Eitt seyðahús stendur innangarðs og í bústaðarøki, og eitt seyðahús stendur uttangarðs<br><br>Tekniska nevnd mælir frá at geva loyvi til frábýti av matr. nr. 194a. | Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá teknisku nevnd. |
| 3. | **10/00419**<br>**Planting millum landsveg og uppdyrkingarveg í Syðrugøtu**<br>Málið hevur verið fyri í Teknisku nevnd, har | Einmælt samtykt at arbeiða víðari við málinum, og taka upp samband við umsøkjarnar og aðrar viðkomandi |

**Býráðsfundur mánadagin 27. januar 2010 kl. 19.30.**

**Á fundi:** Jóhan Christiansen, Hans Mourits Foldbo, Joen Magnus Rasmussen, Páll Isholm , Terji Lervig, Hanna Jensen, Jan Erlingsson Petersen og Tollakur Joensen

**Ikki á fundi:** Fríðgerð Heinesen

**Fundurin lokin kl. 23.30**

| | | |
|---|---|---|
| | samtykt varð ikki at luttaka í verkætlanini.<br><br>Umsøkjarin hevur sent nýggja áheintan um av málið verður viðgjørt av nýggjum í býráðnum, tí at mett verður at um kommunan ikki luttekur í verkætlanini verður trupult at fáa ætlaða stuðulin frá IMR | mynduleikar. |
| 4. | **10/00509**<br>**Umsókn frá G! Grunninum, um at brúka ovaru hæddina á Valhøll til tónleikaramiðstøð.**<br>Trivnaðarnevndin mælir til at umsóknin verður gingin á møti, og at umsitingin fyrireikar eitt upplegg til samstarv saman við umsøkjarunum.<br><br>Fíggjarnevndin mælir til at taka undir við tilmælinum hjá trivnaðarnevndini. | Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá fíggjarnevndini. |
| 5. | **11/00029**<br>**Umsókn frá G! Grunninum um stuðul**<br>Trivnaðarnevndin mælir til at stuðla við kr. 200.000<br><br>Peningurin verður tikin av hesum konti:<br>Kr. 150.000 av konto nr. 5.24.13 – 30 “Ymisk mentanartiltøk”<br>Kr. 10.000 av konto nr. 5.24.14 – 10 “ Stuðul til mentan”<br>Kr. 20.000 av konto nr. 5.24.13 – 40 “ Spælipláss og sparkivallir”<br>Kr. 20.000 av konto nr. 5.24.31 – 10 “Bókasavnið”<br><br>Meirlutin í fíggjarnevndin, Jóhan Christiansen og Fríðgerð Heinesen mæla til at halda seg til fíggjarætlanina, sum eitt samt býráð samtykti og játtað kr. 150.000,00<br><br>Hans Mourits Foldbo tekur støðu á býráðsfundinum. | Málið útsett |

**Býráðsfundur mánadagin 27. januar 2010 kl. 19.30.**

**Á fundi:** Jóhan Christiansen, Hans Mourits Foldbo, Joen Magnus Rasmussen, Páll Isholm , Terji Lervig, Hanna Jensen, Jan Erlingsson Petersen og Tollakur Joensen

**Ikki á fundi:** Fríðgerð Heinesen

**Fundurin lokin kl. 23.30**

**6. 11/00038**

**Fundarskipan fyri Eysturkommunu**

Uppskot til fundarskipan er sent øllum býráðslimun.

Fíggjarnevndin mælir til at leggja málið fyri býráðið.

Einmælt samtykt at beina málið í føstu nevndinar til víðari viðgerð.

**7. 11/00035**

**Leiðsluviðurskiftini í Skúlaspíranum**

Støðutakan til leiðsluviðurskiftini í Skúlaspíranum. Núverandi leiðsla er tvídeild (Skúlastjórin og leiðarin á frítíðarheiminum í Skúlaspíranum). Bæði Lærarafelagið og Føroya Pedagogfelag góðtóku hendan leiðsluform í eitt ár t.v.s skúlaárið 2010/2011. Øll starvsfólkini í skúlaspíranum eru fyribils sett til 1. Juli 2011.

Núverandi leiðsla hevur boðað frá, at tey ynskja at fáa eina útmelding frá kommununi um hvussu verður við leiðslu og starvsfólkum eftir summarfrítíðina. Soleiðis at tey kunnu boða starvfólkunum frá hesum.

Fíggjarnevndin mælir til at, at leiðslan avforskúlanum í kommununi er knýtt at staðsetingini av forskúlanum. Í Eysturkommuna er forskúlin inni í fólkaskúlanum, og tískil verður skúlaleiðarin leiðari av forskúlanum í Eysturkommunu.

Páll Isholm setti fram broytingaruppskot um at málið verður útsett til eftirmetingin av Skúlaspíranum er liðug, og varð tað einmælt samtykt

**8. 11/00054**

**Góðkenning av rokniskapinum hjá bókasøvninum**

Grannskoðaður roknskapur fyriliggur til býráðsfundin.

Einmælt samtykt at góðkenna fyriliggjandi roknskapir.

**9. 11/00046**

**List í sambandi við íløgur í Eysturkommunu**

Uppskot um at nýta uml. 1% av íløgukostnaðinum til list.

Einmælt samtykt at nýta 1% av íløgukostnaðinum til listprýðan.

**Býráðsfundur mánadagin 27. januar 2010 kl. 19.30.**

**Á fundi:** Jóhan Christiansen, Hans Mourits Foldbo, Joen Magnus Rasmussen, Páll Isholm , Terji Lervig, Hanna Jensen, Jan Erlingsson Petersen og Tollakur Joensen

**Ikki á fundi:** Fríðgerð Heinesen

**Fundurin lokin kl. 23.30**

Uppskot til listprýðan av Gøtu skúla fyriliggur.

| | | |
|---|---|---|
| **10.** | **10/00560**<br>**Neystini á Toftanesi**<br>Landsverk hevur sent umsókn um byggiloyvi at byggja 15 neyst við bátahylin á Toftanesi.<br><br>Ummælið frá Selmar Nielsen liggur í málinum.<br><br>Støða verður tikin í býráðnum, tá vónandi neyðug skjøl eru móttikin frá ráðgevaranum. | Einmælt samtykt at útseta málið, tá neyðugu skjøl frá ráðgevaranum ikki fyriliggja. |
| **11.** | **11/00036**<br>**Útbygging av Leirvíkar skúla**<br>Uppskot frá teknisku umsiting fyriliggur.<br><br>Fíggjarnevndin mælir til at arbeiða víðari við málinum útfrá fyriliggjandi tegningum. | Samtykt at taka undir við tilmælinum hjá fíggjarnevndini.<br><br>**Atkvøður fyri:**<br>Jóhan Christiansen<br>Terji Lervig<br>Jan E. Petersen<br>Tollakur Joensen<br>Páll Isholm<br>Fríðgerð Heinesen<br>Hans Mourits Foldbo<br><br>**Atkvøddi blankt:**<br>Tollakur Joensen |
| **12.** | **10/00467**<br>**Grundstykkið á matr. nr. 191 í Leirvík**<br>Støðutakan til um Eysturkommuna skal ognað sær stykkið<br>*Málið verður viðgjørt fyri afturlætnum hurðum* | Málið tikið av skrá. |

## Býráðsfundur mánadagin 27. januar 2010 kl. 19.30.

**Á fundi:** Jóhan Christiansen, Hans Mourits Foldbo, Joen Magnus Rasmussen, Páll Isholm , Terji Lervig, Hanna Jensen, Jan Erlingsson Petersen og Tollakur Joensen

**Ikki á fundi:** Fríðgerð Heinesen

## Fundurin lokin kl. 23.30

**Eysturkommunu býráð:**

Jóhan Christiansen ______________________________

Terji Lervig ______________________________

Hanna Jensen ______________________________

Joen Magnus Rasmussen ______________________________

Hans Mourits Foldbo ______________________________

Tollakur Joensen ______________________________

Páll Isholm ______________________________

Jan Erlingsson Petersen ______________________________